# Hvussu verður Fróðskaparrit nýtt

*The use of Fróðskaparrit*

***Dorete Bloch***
Føroya Náttúrugripasavn, Fútalág 40,
FO-100 Tórshavn.
E-mail: doreteb@savn.fo

## Abstract

Through the last years at the annual session of Fróðskaparfelag the use of Fróðskaparrit has been shown. The distribution between the different sciences is treated, the nationality of the authors and the language they have used. Also the length of the papers and the number of papers in each number. In this paper it is shown in graphs and one table.

## Úrtak

Tey seinastu árini hevur á ársfundi hjá Fróðskaparfelagnum verið víst, hvussu ritið verður nýtt, málsliga, fakliga, nationalt, umframt tal og longd av greinum. Greitt verður frá hesum í myndum og talvum.

## Innleiðing

Fróðskaparrit kom út fyrstu ferð í 1952, og hetta er bók nr. 60. Fróðskaparfelagið hevur altíð verið útgevari fyri ritið, og ein treyt fyri at gerast limur í Fróðskaparfelagnum var upprunaliga, at ein skuldi hava eina grein prentaða í ritið.

Nøkur ár eru gloppin burtur ímillum (1970, 1980, 1984, 1986, 1988, 1990, 1991, 1993), og fleiri ferðir hava verið dupultir árgangir (28-29, 34-35, 36-37, 38-39). Í 1994 komu 3 bøkur út, og hevur tað gjørt, at 60. bók kemur út 60 ár eftir 1. bók.

Fleiri ferðir hevur verið tosað um at niðurleggja Fróðskaparrit, men ein grund til at varðveita ritið er, at flestar greinar eru so grundleggjandi um føroysk viðurskifti, at onnur tíðarrit neyvan høvdu prentað tær.

Ein onnur próvgrund fyri at niðurleggja ritið er, at ongin kennir til ritið, og at tað sostatt ikki verður víst til ritið av útlendingum. Hartil er bara at siga, at rithøvundarnir sjálvir mugu gera vart við greinar sínar í Fróðskaparriti, deils við at vísa til greinar í ritinum, tá ein skrivar í øðrum tíðarritum, og deils við at lýsa tær í altjóða leypandi greinasøvnum.

Upprunaliga var eitt endamál við Fróðskaparritum at menna føroyskt vísindamál, og her er nógv hent tey farnu 60 árini. Nógv fleiri granskarar eru komin til, og eisini eru fleiri almenn tíðarrit komin, har alt er skrivað á føroyskum, t.d. Frøði, Smárit, Fiskirannsóknir, Veingjasuð og Málting.

Hvørt ár hevur á ársfundi hjá Fróð-

skaparfelagnum verið víst eitt power point show, ið vísir, hvussu Fróðskaparrit hevur verið brúkt gjøgnum árini. Hvør skrivar í ritið, bert føroyingar ella eisini útlendingar? Á hvørjum máli verður skrivað? Hvussu langar eru greinarnar, og hvussu nógvar greinar eru í hvøjari bók. Hvørt ár verður eitt ár lagt afturat, og í hesi grein verður víst, hvussu gongdin hevur verið í nýtsluni av Fróðskaparritum.

## Tilfar

Øll 59 Fróðskaparrit hava verið gjøgnumgingin fyri tal av greinum, mál, longd og nationaliteti hjá rithøvundunum. Øll tølini eru skrivað inn í eitt rokniark (excel) og viðgjørd á ymiskan hátt.

## Viðgerð

At finna permumynd er altíð ein trupulleiki. Bílætið skal hava samband við eina av greinunum og samstundis fanga eygað. Her eru fornfrøði og náttúruvísindi takksom. Tað fangar eygað beinan vegin. Tað er verri við hugvísindaligum greinum, tí orð fanga ikki á sama hátt, tí orðini oftast standa ov smátt. Roynt hevur tó verið eftir besta førimuni at skifta millum hug- og náttúruvísindaligar permumyndir.

## Tal av greinum

Tær 59 bøkurnar innihalda 527 greinar, í miðal 9,6 ± 0,2 í hvørji bók (mynd 1), millum 4 og 30 greinar pr. bók (mynd 2). Topparnir á mynd 1 eru bøkurnar til Jákup Jakobsen 100 ár (bók 13); Chr. Matras 70 ár (bók 18); Sverri Dahl 70 ár (bók 28-29).




Mynd 1. Tal av greinum.




Mynd 2. Greinatal pr. bók

## Greinalongd

Ein grein hevur verið 150 síður (bók 51) og ein afturat uppá 95 síður (bók 47). Restin av teim 527 greinunum hava verið frá 1-76 síður til longdar, og í miðal eru greinarnar 15,8 ± 0,6 síður langar (mynd 3).




Mynd 3. Síðutal pr. grein.

### Býtið millum vísindagreinar

Býtið millum vísindagreinar hevur stórt sæð staðið millum hugvísindi og náttúruvísindi. Greinar innan fyri løgfrøði og læknafrøði hava verið spjaddar, og mest tá ein lækni ella ein løgfrøðingur skuldu gerast limur í Fróðskaparfelagnum, hava teir skrivað eina grein og oftast bara hesa eini grein (mynd 4). Teir 3 topparnir í hugvísindum eru bøkurnar til Jákup Jakobsen 100 ár (bók 13); Chr. Matras 70 ár (bók 18); Jóannes í Króki 200 ár (bók 41). Náttúruvísindi hava havt eitt blómandi tíðarskeið í bókum 40-50, mest




Mynd 4. Býtið millum vísindagreinar.

tí fleiri lívfrøðingar vóru settar í starv, og fleiri hava sent greinar til ritið, ið hava verið partur av teirra endapróvtøku.

### Rithøvundarnir

Einasta krav til Fróðskaparrit er, at greinarnar skulu snúgva seg um Føroyar á ein ella annar hátt. Føroyar hava verið rannsóknarevni hjá nógvum fólkum, eisini uttanífrá, men kortini eru 67 % av greinunum skrivaðar av føroyingum við ein breidd millum 17 og 100 % (mynd 5).




Mynd 5. 67 % føroyskir rithøvundar

### Mál brúkt í Fróðskaparritum

Upprunaliga var krav, at greinarnar skuldu vera á føroyskum; seinni varð tó slakað upp á hetta krav, hóast eitt endamál við ritinum var at menna føroyskt vísindamál. At hetta eisini er eydnast sæst millum annað av, at 54,7 % av øllum 527 greinunum eru á føroyskum (mynd 6). Tað er tó eisini týðiligt, at meðan tær fyrstu 12 bøkurnar eru skrivaðar 100 % á føroyskum, minkar tann føroyski parturin so líðandi, og enskt vinnur meira fram (mynd 7). Hetta er fyrst og fremst galdandi fyri tær náttúruvísindaligu greinarnar, har bert

22 % eru á føroyskum (mynd 9), meðan hugvísindi við 55 % á føroyskum standa seg betur (mynd 8). Hetta hevur nakað at gera við tann málbólk, tær ymisku vísindagreinirnar skriva fyri. Í málbólkinum hjá hugvísindum duga fleiri at lesa føroyskt, meðan hetta ikki er galdandi fyri náttúruvísindi.




Mynd 6. Mál brúkt í Fróðskaparritum.




Mynd 7. 55 % skrivað á føroyskum







Mynd 8. 63 % hugvísindi skrivað á føroyskum

Mynd 9. 22 % náttúruvísindi skrivað á føroyskum

## Føroyingar skriva á føroyskum?

Tað er skilligt, at bara heilt fáir útlendingar duga at skriva á føroyskum, men hvussu við føroyingum? Her er týðiligt, at meðan danskt bert hevur ein minni leiklut (4,3 %, mynd 6) hevur enskt vunnið meira og meira fram (37,1 %, mynd 6; mynd 10). Hetta er mest orsakað av teim náttúruvísindaligu greinunum.




Mynd 10. Mál brúkt av føroyingum

## Ritstjórar

Jóannes Rasmussen og Hans Debes Joensen vóru teir, ið løgdu lunnar undir Fróðskaparrit, júst við endamálinum at menna eitt fakmál á føroyskum. Teir vóru treiskir og vóru báðir ritstjórar á teim fyrstu 25 bókunum (tavla 1). Teirra treiskni kundi væl verið grundin til, at ritið er til enn.

| Ritstjórar | bók |
|---|---|
| Hans Debes Joensen | 1-25 |
| Jóannes Rasmussen | 1-25 |
| Jóhannes av Skarði | 11-22 |
| Jóhan Hendrik Winther Poulsen | 23-38/39 |
| Høgni Debes Joensen | 26-32 |
| Jóan Pauli Joensen | 26-40 |
| Elin Súsanna Jacobsen | 30-40+45-47+57→ |
| Hans Pauli Joensen | 33-36/37 |
| Arne Nørrevang | 40+49 |
| Sjúrður Rasmussen | 40-43 |
| Eilif Gaard | 40 |
| Dorete Bloch | 41 → 59 |
| Andras Kristiansen | 41-44 |
| Eyðun Andreassen | 42 |
| Rannveig Winther | 42-46 |
| Pehr H. Enckell | 46 |
| Anfinnur Johansen | 48 |
| Firouz Gaini | 54-56 |

Tavla 1. Ritstjórar á Fróðskaparritum

## Bókmentir

Fróðskaparrit 1-59. 1952-2011. Føroya Fróðskaparfelag. Tórshavn.